# Vindmyllur avloysa oljuna

**Føroyar eiga at gagnnýta ta ovurhonds stóru vindorkuna, vit hava í Føroyum, í nógv størri mun enn higartil. Hetta heldur arkitekturin, Kári Thomsen, ið hevur gjørt eina ætlan, hvussu vindorkukervið kann útbyggjast. 39 vindmyllur skulu setast upp kring oyggjarnar, og um átjan ár, skal vindurin avloysa oljuna**

VINDORKA
*Stefan í Skorini*



*SEV skuldi gjørt meira við vindorkuna, enn felagið higartil hevur gjørt. Kári Thomsen skýtur upp at seta 39 vindmyllur upp í Føroyum næstu 20 árini*

SEV hevur gjørt alt ov lítið við at útbyggja vindorkukervið í Føroyum seinastu árini. Ein vindmylla varð sett upp í Neshaganum í 1993, og hon hevur riggað væl, men síðani er einki hent á tí økinum. Ístaðin hevur SEV satsað uppá vatnorku og hevur útbygt fyri nógvar hundrað milliónir á tí økinum.

Hetta heldur Kári Thomsen, ið hevur gjørt eitt vindmylluatlas fyri Føroyar. Hann mælir til, at 39 vindmyllur verða setta upp í Føroyum. Soleiðis kunnu føroyingar minka um termisku orkuna, ið verður útvunnin við at lata olju á dieselmotorar. Termiska orkan dálkar illa, tí útlátið av koltvíiltu er stórt.

Í 1999 stavaðu 64,9% av samlaðu orkuframleiðsluni frá dieselorkuverkum, 34,8% stavaðu frá vatnorku, men bara 0,3% kom frá vindmylluni inni á Nesi.

Allur heimurin hevur við Kyoto-avtaluni bundið seg til at minka um útlátið av $CO_2$ ella koltvíiltu, tí tað økir um vakstrarhúsárini, sum hevur við sær, at heimurin gerst alt heitari. Føroyar vildu fegin hava undantaksloyvi í hesum førinum, og USA boðaði frá, at tað fór ikki at vera við í hesi avtaluni.

– Vit føroyingar mugu eisini taka stig til at minka um $CO_2$ útlátið, og við at gagnnýta vindorkuna ber tað til, sigur Kári Thomsen, sum hevur fingið stuðul til verkætlanina frá oljumálastýrinum, sum stuðlar umhvørvisverndar tiltøk.

## Útbyggingar krevjast

Ætlanin hjá Kára er í stuttum henda: Komandi 20 árini skulu 39 vindmyllur setast upp í Føroyum. Hetta krevur stórar útbyggingar á el-kervið, men hann heldur, at tað avgjørt er møguligt at fremja hesa ætlan í verki.

Um 20 ár er ætlanin, at dieselverkini verða avtikin og vindorka verður nýtt ístaðin. Vindmyllurnar skulu samstundis nøkta eltørvin hjá føroyingum, og hann hevur roknað við einum vøkstri í orkunýtsluni á 2 prosent um árið.

Tað eru tó ávísir trupulleikar við vindorkuni, og eitt er, at vindurin ikki er støðugur. Tí kann ein vindmylla ikki framleiða streym allatíðina, sum eitt vatnorkuverk, ið framleiðir streym, tá vatn rennur úr byrgingini.

Kári Thomsen vísir tó á, at tað nú ber til at goyma streym frá vindmyllum. Hetta verður gjørt við elektrolysu, sum ikki dálkar umhvørvi.

## Vindorka er bíligari

Kári Thomsen vísir í sínum verki á, at fleiri fyrimunir eru við at nýta vindorku heldur enn vatn og olju.

Oljan dálkar luftina illa, og tað er hana vit dúva mest uppá í løtuni. Vatnorkuverkini órógva náttúruni, tí neyðugt er at gera stórar byrgingar og at tøma áirnar í økinum. Hetta er eitt nú gjørt á Eiðisvatni og í Funningsfirði.

Kári Thomsen sigur, at verkætlanin á Eiði kostaði SEV 330 milliónir krónur at gera, og vatnorkuverkið framleiðir 30 gigawatt.

Hinvegin høvdu tríggjar vindmyllur kunnað framleitt somu orku, og tað hevði bara kostað einar 50 milliónir krónur.

Arkitekturin hevur sett seg í samband við ein danskan framleiðara av vindmyllum, ið vil vera við til at seta vindmyllur upp í Føroyum.

– Tað er óskiljandi, at SEV ikki hevur lagt seg meira eftir at seta fleiri vindmyllur upp í Føroyum, tí teir hava góðar royndir við mylluni á Nesi, sigur Kári Thomsen.

## Eingin orkupolitikkur

Kári sigur, at hansara uppskot er eisini ein ábreiðsla á landsins myndugleikar, sum ikki hevur orðað nakran orkupolitikk yvirhøvur, meðan kommunali felagsskapurin SEV tekur allar týðandi avgerðirnar á hesum økinum.

– Hetta er eitt so týdningarmikið øki, at tað skuldi verið stýrt av landinum, men har er einki at frætta, sigur Kári Thomsen.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við orkumálum, sigur, at orkupolitikkur hevur ligið á láni í fleiri ár, men hann ber tó í bøtuflaka fyri hesum. Hann hevur í heyst biðið landsverkfrøðingin um at orða ein orkupolitikk fyri vinnumálastýrið.

Hetta tilmæli skal síðani leggjast fyri tingið til aðalorðaskifti, so at landsins myndugleikar kunnu vita, hvørja støðu tingið hevur í hesum málinum.

Eitt starvsfólk á landsverkfrøðinginum hevur fingið uppgávuna at orða henda orkupolitikkin, men tað er eitt stórt arbeiði, og tí verður einki lagt fyri tingið í hesi tingsetuni. Væntandi gongur í øllum førum eitt ár, áðrenn nakað er klárt.

Kári Thomsen væntar, at myndugleikarnir fara at taka hansara vindatlas til eftirtektar, og at okkurt úrslit spyrst burturúr.

# SEV satsar uppá vatnorku

**Tað er einki dulsmál, at SEV heldur satsar uppá vatnorku enn vindorku. Klæmint Weihe, stjóri í SEV, sigur, at vatnorkan er støðugari og meira álítandi enn vindorkan. Harafturat metir hann ikki, at tað er realistiskt at seta 39 vindmyllur upp í Føroyum**

VINDORKA
*Stefan í Skorini*




*Klæmint Weihe, stjóri í SEV, hevur ongar ætlanir um at útbyggja vindorkukervið í Føroyum í nærmastu framtíð*

SEV hevur ongar ætlanir um at framleiða vindorku í størri mun enn higartil. Bara ein vindmylla framleiðir streym, og ongar ítøkiligar ætlanir eru um at økja um talið av vindmyllum.

– Vit hava valt betri hættir at framleiða orku, og tað hava vit gjørt við at satsa uppá vatnorku ístaðinfyri vindorku. Vatnorkan er ein nógv betri orka enn vindur, tí hon er varandi og støðugari, sigur Klæmint Weihe.

Hann vísir á, at við vatnorkuni framleiðir tú streym, tá tørvur er á honum.

Stjórin í SEV vil ikki útihýsa møguleikanum, at SEV fer at útbyggja vindorkukervið í Føroyum seinni í tíðini, men ongar ætlanir eru um tað nú.

Hann vísir á, at el-kervið í Føroyum er veikt og tolir lítið av, og møguleikarnir fyri útbygging tí eru avmarkaðir.

## Vatn er álítandi

Klæmint Weihe heldur, at vatnorkan er støðugari og tí velur SEV heldur vatn enn vind. Víst verður í tí sambandi á, at ein vindmylla skal skiftast út nakrar ferðir, men ein verkætlan sum Eiði III kann nýtast í eini 100 ár.

Vatnorkan er støðugari og hevur longri livitíð, og tað er orsøkin til, at SEV velur at satsa uppá vatnorkuna.

– Harafturat er tað órealistiskt og hevur einki við veruleikan at gera, tá talan er um at seta 39 vindmyllur upp í Føroyum, sigur Klæmint Weihe.

At enda vísir hann á, at trý krøv eru til øki, har vindmyllur skulu setast upp. Tey skulu hava støðugan vind, vegasambandið skal vera gott og ein háspenningslinja skal vera nær við.